## Riddarakrossur á mentanarnátt

Fyrsta fríggjadag í juni verður sum vant skipað fyri mentanarnátt í Havn. Í ár rakar mentanarnáttin grundlógardag. Tí fara limirnir í punk-rokkbólkinum 200 alment at handa ein riddarakross við hornblásturi í Vágsbotni mentanarnáttina klokkan 18:30 Skráin fyri mentanarnáttina 5. juni 2009 byrjar longu klokkan 10 um morgunin og endar klokkan 04 morgunin eftir. Saman við handlum í Havn, samskipa Kunningarstovan og Tórshavnar kommuna, ið fyllir 100, øll tiltøkini sum eru á skránni mentanarnáttina 2009. Skráin fyri mentanarnáttina 2009, ið vendir sær bæði til børn og vaksin, verður kunngjørd á tíðindafundi í Norðurlandahúsinum týsmorgunin 2. juni 2009 klokkan 9:00.



# Yvir 20 milliónir til barnafamiljur í Kvívík



*Í Kvívík eru tey farin undir arbeiðið at gera ein stóran stovn til børnini í kommununi og í mars verður klárt hjá 100 børnum at flyta inn*

**Í Kvívík eru tey farin at byggja vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla til 100 børn. Onkur kundi kanska sagt, at vit gera ov nógv av, men vit halda, at tað er neyðugt við hesi íløguni, sigur borgarstjórin**

ÍLØGA Í BØRN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í Kvívík skal tað vera gott at vera barnafamilja.

Tað er orsøkin til, at tey nú eru farin undir eina risa íløgu fyri at lívga um hjá foreldrum við børnum.

Tilsamans er talan um eina íløgu upp á 22 milliónir, sum nú verða lagdar í barnafamiljurnar og tað er eitt stórt tak hjá eini kommunu, sum Kvívíkar.

I hesum sambandi er kommunan nú farin undir arbeiðið at byggja nýggjan barnastovn í bygdini, sum umfatar bæði vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla.

Tilsamans verður pláss fyri 100 børnum á stovninum, sum verður liðugur í vár og ætlanin er at taka hann í nýtslu í mars mánað næsta ár.

### Væl fyri

Men hóast talan er um eitt ódnartak, staðfestir borgarstjórin, at talan er á ongan hátt um eina óforsvarliga íløgu, sum fer at koppa kommununi fíggjarliga.

- Kommunan skyldar onki frammanundan og tí hava vit ráð at fara undir eina íløgu, sum hesa, uttan at koma í óføri.

Av teimum 22 milliónunum, sum hesin nýggi stovnurin kostar, er ætlanin at læna 16 milliónir.

Tað er ein sløk álíkning, tí inntøkan hjá kommununi av skatti og øðrum, verður 19 milliónir og í ár.

So hóast lántøkuna til stovnin, kemur kommunan ikki upp undir lógarkravda hámarkið fyri, hvussu nógv ein kommuna kann skylda, tí tað markið er ein álíkning.

- Og ætlanin er at betala skuldina aftur upp á fimm ella seks ár, staðfestir. borgarstjórin.

### Neyðug íløga

- Onkur heldur kanska, at hetta er at gera í so nógv av, heldur borgarstjórin, Dánjal Petur Müller, borgarstjóri í Kvívík.

Men hann staðfestir eisini, at eftir hansara tykki er brúk fyri eini íløgu, sum hesari, serliga tá ið hugsað verður um framtíðina.

Og hann heldur hóast alt, at tað er frægari, at stovnurin verður bygdur ímeðan Kvívíkar Kommuna enn er til, tí verður talan um kommunusamanlegging, er ikki sagt at tann samanlagda kommununa eisini er samd um, at talan er um eina neyðuga íløgu og so er tað ikki vist, at stovnurin hevði verðið bygdur.

Dánjal Petur Müller sigur, at sum støðan er í løtuni, húsast vøggustova, barnagarður og frítíðarskúli í trimum ymsum hølum og

- Í løtuni eru 70 børn í skipanini, so tað er avgjørt brúk fyri betri umstøðum, sigur hann.

Tað búgva 605 fólk í Kvívíkar kommuna, men tað búgva nógvar barnafamiljur á staðnum.

Umframt barnastovnin, hevur kommunan eisini eina útstykking í Leynum í ger til eini 25 hús.

Tað fer neyvan at standa á at sleppa av við grundstykki, tí tað eru væl fleiri umsóknir um grundstykki og tað eru eisini nógv fólk aðrastaðni frá, sum hava hug at búsetast í kommununi.

# Bjarni Bæk prædikar á Ólavsøku

**Skipanin, har tað er tann seinast setti presturin, sum prædikar á Ólavsøku, er broytt, so hereftir verður tá frá teimum elstu og niðureftir, sum fáa heiðurin**

ÒLAVSØKA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður Bjarni Bæk, dómpróvstur, sum fær heiðurin at halda ólavsøkuprædikuna í ár.

Tað staðfestir Jógvan Fríðriksson, bispur.

Áður var tann skipanin galdandi, at tað var tann seinast setti presturin, sum fekk heiðurin at prædika á Ólavsøkugudstænastuni.

Men í sambandi við, at Kirkjan er yvirtikin og løgd undir heimastýrið, hevur bispur nýtt høvi til at broyta skipanina so at tað nú verður tann presturin, sum hevur verið longst í starvi, sum skal prædika á Ólavsøku.

Fyrsta árið helt bispur sjálvur ólavsøkuprædikuna, men tað var tí, at hann er hægsti myndugleiki yvir kirkjuni.

Í ár verður tað so dómpróvsturin og síðani verða tað prestarnir, við hægsta starvsalduri, sum prædika á ólavsøku.

So um nøkur ár endar tað í veruleikanum aftur í teirri skipan, at tað verður tann yngsti presturin, sum prædikar á Ólavsøku, tí farið verður niður ígjøgnum skipanina.



*Bjarni Bæk, dómpróvstur, skal halda ólavsøkugudstænastuna í ár*